# Forargað inn á Kringvarpið

OLUFFA JOENSEN

Sum borgari í Gøtu kommunu eri eg rættiliga forargað inn á Kringvarp Føroya, bæði útvarpið og sjónvarpið. Mánkvøldið hevði sjónvarpið eitt negativt innslag um G! festivalin, ið eg hevði torført við at síggja motivini aftanfyri. Hvørjum tænir tað? Eg spyrji bara.

Hevði tað ikki verið upp á sítt pláss at roynt at spælt eitt sindur av tónleikinum, ið verður á hoyra á G!, heldur enn at rópa við í kórinum hjá teimum atfinningarsomu. Hetta hevði givið øllum teimum, ið ivast og finnast at, møguleikan at hoyrt, at festivalurin aftur í ár borðreiðir við tónleiki í heimsflokki. Hetta hevði verið serliga aktuelt, tá tikið verður til eftirtektar, at fólk gremja seg um, at tey ikki kenna tónleikin hjá nøvnunum, sum koma á G!, hóast talan er um heimskend nøvn sum Beth Hart, The Holmes Brother og Infernal, og nøkur av teimum allar bestu og størstu nøvnunum á norðurlendska tónleikapallinum sum Outlandish, Kaizers Orchestra, Teitur, Eivør og Mugison.

Eg undri meg eisini á, hví vit næstan bara hoyra tónleik, ið verður á Summarfestivalinum í útvarpinum, meðan tónleikurin, sum verður á G!, so at siga ikki verður spældur. Her hugsi er serliga um Siesta-sendingina, har so eyðsæð nógv meira ljós verður varpað á Summarfestivalin enn G! festivalin. Lurtaraskarðin hjá Siesta eru kanska serstakliga nøkur av teimum, ið eru mest ivasom um tey skulu fara á G! Tey eiga at fáa ein møguleika at læra allan tann góða tónleikin, ið verður á festivalinum, at kenna.

Tað var als ikki upp á sítt pláss at Siesta-manningin fór norður til Klaksvíkar í seinastu viku og enn einaferð varpaði ljós á Summarfestivalin, uttan at steðga á í Gøtu tosaða við G!-fyriskipararnar og spæla onkran tónleik hagani. G! festivalurin byrjar altso um eina viku, meðan tað er ein lítil mánaður til Summarferstivalin.

Annars skal sigast, at onkur einkultur útvarpsvertur spælir eitt sindur av tónleiki, sum verður á G! um kvøldarnar, men trupulleikin er bara, at tey meira tilkomnu hoyra sjáldan hetta, tí tá hyggja tey í Sjónvarp.

Nú ljóðar hetta kanska, sum at eg havi okkurt ímóti Summarfestivalinum, men tað havi eg so avgjørt ikki. Eg ætli mær sjálv á Summarfestival, og eg gleði meg. Men vit í Gøtu eru eisini sera glað og góð við G! festivalin, og tað nívur, at tað, ið kemur fram um festivalin í Kringvarpinum, bara er negativt. Takið eisini tað positiva fram og spælið eitt sindur av tónleikinum, sum verður á G, eitt nú Beth Hart, ið eg gleði meg sum at barn til at hoyra. Hon verður eitt stórt hitt.

Annars haldi eg, at tað er møsn tá sagt verður, at G! er bert fyri tey ungu. Hvørt ár og eisini í ár verður nógvur góður tónleikur fyri okkum meira tilkomnu.

## Fjølmiðlanevndin er sett

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum hevur valt Barbaru Vang, Ingolf S. Olsen, Inga Samuelsen og Halgir W. Poulsen at manna fjølmiðlanevndina

Í nevndini sita Barbara Vang, løgfrøðingur, sum er vald av landsstýrismanninum, Ingolf S. Olsen, tíðindafólk, sum er valdur eftir tilmæli frá Føroya Blaðmannafelag, Ingi Samuelsen, blaðstjóri, sum er valdur eftir tilmæli frá teimum fjølmiðlum, sum sambært § 1 í lógini um fjølmiðlaábyrgd koma undir lógina, og Halgir W. Poulsen, advokatur, sum er valdur eftir tilmæli frá Fróðskaparsetrinum.

Fyri hesar limir eru valdir tiltakslimir. Hesir eru Nella Festirstein, løgfrøðingur, Randi Jacobsen, tíðindafólk, Jóhann Mortensen, tíðindaleiðari og Marjun Bæk, sóknarprestur.

Fjølmiðlanevndin skipar seg sjálv.

## Vestlax størri enn Bakkafrost

**Rætting:** Yvirskriftin í Sosialinum nr. 129 – 7. juli 2006 »Føroya størsta alisamtak nakrantíð til verka« var misvísandi.

Upplýsast skal at P/F Vestsalmon hevði sambært ársroknskapin fyri 2001 Kr. 898.623.503,00 í umsetningi við einum starvsfólkatali uppá 630 fólk. Eginpeningurin var (Vestsalmon 71,3 mió x 0,68*) =48,5 + (Vestlax) 85,3 = 133,8 mió. uttan upptøku fyri nøkrum formi av virði á aliloyvum.

Vestlax samtakið var sostatt tríggjar ferðir so stórt sum Bakkafrost holding, og felagið er upptikið við 32% í Vestlax

Vit vilja hervið umbera mistakið.

**Blaðm.**

# Býráðið vil binda um heilan fingur

**- Fáa fólk, kanska serliga børn, bakteriur í seg, kunnu tey gerast magasjúk. Tí hevur býráðið valt at binda um heilan fingur og ávara almenningin um dálkingina í Sandagerði, til viðurskiftini eru fingin í rættlag aftur, sigur Elin Lindenskov, forkvinna í heilsu- og umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar býráð**

DÁLKING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*- Fólk verða nú ávarað ímóti at svimja niðarliga í Sandá og í ósanum, tí tað kunnu fólk gerast sjúk av, serliga børn*

- Tað er ikki longur heilt vandaleyst at svimja í Sandagerði.

Tað boðaði Tórshavnar Býráð frá í gjár.

Sostatt mælir býráðið fólki til at ansa sær, áðrenn tey fara út í Sandagerð at dusa sær í góðveðrinum í summar.

Og í sjálvari Sandá og í Ósanum, verður beinleiðis mælt frá at svimja.

Elin Lindenskov, forkvinna Heilsu- og umhvørvisverndini hjá Tórshavnar Býráð, sigur, at orsøkin til ávaringina er, at Helsufrøðiliga Starvsstovan hevur funnið ymsar bakteriur í ánni og í Ósanum.

Tað er í einum hyli oman fyri Eikina, at mælt verður frá at svimja, eins og tað heldur ikki er ráðiligt at fara útí í sjálvum ósanum. Bæði í hylinum og í Ósanum er annars heilt vanligt at børn svimja og svansa í góðveðrinum.

Annars er tað vandaleyst at svimja longur úti á Sandagerði og í Sandagerðsvík, tí har er onki funnið.

### Dálkað av kloakkvatni

Tað eru koliformar bakteriur og termotolerantar bakteriur, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur funnið ov nógv av í ánni og í ósanum.

Hetta eru bakteriur, ið liva í maganum á fólki.

- Vit mugu staðfesta, at tað er onkur kloakk, sum lekur út í ánna og í ósan við vatni úr septiktangum, sigur Elin Lindenskov.

Og tað kann elva til sjúku, serliga hjá smærri børnum, fáa tey dálkað vatn í seg.

- Tað er rættiliga nógv fólk í Sandagerði um summarið og tí hildu vit, at tað var rætt at binda um heilan fingur, sigur Elin Lindenskov.

### Longu í fjør

Tað var longu í fjør, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan staðfesti ov nógvar bakteriur í ánni og ósanum. Men ein kanning er ov lítið til at taka eina avgerð á. Og tá ið vit gjørdi eina kanning afturat, varð verkfall og tí spiltust kanningarnar.

Samstundis skal tað verða ein ávísur hiti í luftini, tá ið kanningarnar verða gjørdar og tí eru tær ikki gjørdar aftur, fyrrenn í ár.

Tað er helst kloakkir frá onkrum síðugøtum til Velbaðstaðvegin, sum eru farnar at leka.

- Onkrar lekar hava vit funnið og teir verða umvældir. Tað, sum er kommunalt, ger kommunan og tað, sum er privat, hava eigararnir fingið boð um at gera ístand.

Men um allir lekar eru funnir, er ilt at siga.

Elin Lindenskov sigur, at fáa fólk, kanska serliga børn, bakteriur í seg, kunnu tey gerast magasjúk og tí hevur býráðið valt at binda um heilan fingur og ávara almenningin, til viðurskiftini eru fingin í rættlag aftur.

Nú verða so skelti sett upp úti í Sandagerði, sum siga frá, at mælt verður frá at svimja í ósanum.

Annars skulu áhaldandi kanningar gerast fyri at vita, hvussu gongdin er og fyri at staðfesta, um allir kloakklekarnir, eru funnir.

Og ið Sandagerð er reint aftur, verður boðað frá, beinanvegin, sigur forkvinnan í Heilsu- og umhvørvisnevndini.

Hinvegin sigur hon, at ongin vandi er fyri at drepa grind í Sandagerði, tí grindir verða dripnar longur úti og tað verður heldur ikki skorið upp í Sandagerði.



*- Kommunan rættar tey brek á kloakkirnar, sum kommunan eigur, meðan privatfólk fáa boð um at rætta teirra brek, sigur Elin Lindensikov, forkvinna í heilsu- og umhvørvisnevndini*